29. mars 2007

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 3/2007

Tíð: Mikudagin 28. mars 2007, kl. 13-15.30
Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 2/2007 setursráðsfundi 22. februar 2007.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál:**
   a. **Fíggjarløgtingslóg 2007, staðfesting av býti.** (J.nr. 0015-01855). Setursskrivstovan hevur ikki fingið øll neyðugu tølini frá deildunum, málið útsett til komandi fund. Deildirnar verða bidnar at fáa tølini til vega í góðari tíð fyri fundin.
   b. **Fíggjarløgtingslóg 2008, staðfesting av skrivi til Mentamálaráðið.** (J.nr. 0015-1999). *Fundarskjal: Skriv til Mentamálaráðið, dagfest 28. mars, 4 s.* Skriv orðað og góðkent millum funda. Staðfest.

4. **Hølisleiga í Jónas Broncks gøtu.** (J.nr. 0035-02000). Mentamálaráðið hevur undirskrivað avtalu um leigu vegna Fróðskaparsetrið. Sáttmálin liggur hjá LV til góðkenningar. Setursráðið varð kunnað um munnlig boð frá Mentamálaráðnum um, at søkt er um eykajáttan til hølisleigu, meðan stovnurin má bera kostnaðin av innbúgvi o.s.fr. Setursráðið metti hetta vera óforsvarligt tí játtan er ikki tøk til hetta og tað er Mentamálaráðið kunnað um. Setursráðið heitti á rektaran um at taka málið uppaftur við Mentamálaráðið. Rektarin arbeiðir víðari við málinum.

5. **Setan av stjórnmálafrøðingi á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0021-02015). Eftir tilmæli frá Søgu- og samfelagsdeildini góðkendi setursráðið, at deildin kannar møguleikan at seta vísindaligan avloysara fyribils í eitt ár, meðan arbeitt verður við, hvussu deildin skal skipast framyvir. Deildarleiðarin sendir setursráðnum ítøkiligar ætlanir til góðkenningar sum skjótast.

6. **Fyrispurningur frá Kringvarpi Føroya um málsliga ráðgeving.** *Fundarskjal: Bræv frá Jógvan Jespersen, stjóra, 1 s.* Málið hevur eftir áheitan verið fyri á fundi á Føroyamálsdeildini. Eivind Weyhe kunnaðu um støðuna hjá deildini. Kjak um møguleikar í málinum. Setursráðið heitti á deildina um at gera uppskot til svar til Kringvarpið. Verður at góðkenna millum funda.

7. **Áhugagreining til Fróðskaparsetur Føroya.** *Fundarskjal: Uppskot frá Signari P. Heinesen til arbeiðssetning og skipan, dagfest 26. mars, 3 s.* Setursskrivarin kunnaði setursráðið um samskiftið um hetta málið. Setursráðið samtykti at fara undir hetta arbeiðið við støði í punkt 3,. í uppskotinum. Setursskrivarin verður akkersfólk, meðan setursráðið verður stýrisbólkur. Setursskrivarin tekur sær av málinum.

8. **Skøran.** (J.nr. 0017-02031). Setursskrivarin reisti spurningin um í hvørjum høpi og liti búmerki Fróóðskaparsetursins kann brúkast. Kjak um málið. Setursskrivarin ger uppskot til leist, sum verður sent setursráðnum til góðkenningar.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundir á Føroyamálsdeildini 23.2.07 og 27.3.07.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 15.3.07.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 20.3.07.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

10. **Próvdómaragóðkenningar at staðfesta** (J.nr. 0026-01525).
   a. **Eftir tilmæli frá Søgu- og Samfelagsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Hans Mikkelsen, cand.mag., Føroya Studentaskúla og HF-skeið til *Søgu*.**
   b. **Mentamálaráðið hevur eisini formliga góðkent metingarnevndir til *Ph.D.verjur*: Bogi Hansen, Fiskirannsóknarstovan - Judith Wolf, Proudman Oceanographic Laboratory, Liverpool – Jack Monbaliu, Katholieka Universiteit Leuven – Jan Arge Jacobsen, Fiskirannsóknarstovan – Fransisco Rey, Havforskningsinstituttet, Bergen – Roger Philip Harris, Plymouth Marine Laboratory, Plymouth.**
   Staðfest.

11. **Góðskriving. Føroyamálsdeildin mælir til, at Erla Borðoy fær part av *Vísindaástøði 4 ECTS* í B.A. í føroyskum góðskrivað fyri *Grundskeið í vísindaástøði 5 ECTS*, sum hon hevur tikið á Søgu- og Samfelagsdeildini. Góðskrivingin inniber, at hon bert skal taka bókmenta- og málsliga partin av *Vísindaástøði 4 ECTS* á deildini. At góðkenna.**
   Góðkent.

12. **Viðvíkjandi tilmæli av limi í Orðabókagrunnin fyri tíðarskeiðið 1.1.07 – 31.12.10. Føroyamálsdeildin hevur samtykt at tilmæla Eivind Weyhe í nevndina. At góðkenna.** (J.nr. 0011-02033).
    Góðkent.

13. **Býti av námsferðarstuðli 2007 at staðfesta.** (J.nr. 0071-01935).
    Staðfest.

14. **Gjøld/mannagongd fyri uttansetturs próvtøkur endurskoðað. At staðfesta.** (J.nr. 0048-02006).
    Staðfest.

**Kunningarmál:**

15. **Mánaðarjavnar:**
    a. **Ultimo desember 2006, 2. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt setrið 19.059.400 kr = 99,9% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).
    b. **Ultimo februar 2007, nýtsla fyri alt setrið 2.554.300 kr = 13,2% av játtanarkarmi uppá 19.364.000 kr.** (J.nr. 0015-1855).

16. **Verja av Ph.D.-ritgerðini "An Operational Wave Model for the Faroe Shelf" hjá Bárði A. Niclasen verður í høllini á Vinnuháskúlanum 2. apríl 2007 kl. 15.** (J.nr. 0043-01083).

17. **Játtan 2007 til undirvísingar-/telduútgerð: Føroyamálsdeildin 40.000 kr til teldur, Náttúruvísindadeildin 194.000 kr til telduútgerð og Søgu- og Samfelagsdeildin 40.000 kr til teldur.** (J.nr. 0015-01921).

18. **Kanadiski sendiharrin í Keypmannahavn, Fredericka Gregory vitjaði Fróðskaparsetrið 1.3.07. Rektarin og setursskrivarin tóku ímóti.** (J.nr. 0019-02025).

19. **NUAS-seminar í Tromso 19.-22.5.07 "Økonomiadministrasjon i forandring – bedre beslutningsstøtte og service?".** (J.nr. 0014-02029).

20. **Martin Zachariassen frá KU heldur seminar 30.3.07 á Náttúruvísindadeildini fyri setursfólki um broyting av organisatiónsstrukturi á KU viðvíkjandi undirvísing, nýggja karakterskalan og nýtslu á universitetsstigi og um royndirnar við nýggja blokkstrukturinum (4 kvartal heldur enn semestur).**

21. **Rapport "Overview of the Fishing Industry's Influences in the Faroe Islands" frá Juha Keinänen og Lauru Nurmi, University of Joensuu. Juha og Laura fingu námsferðarstuðul í fjør.** (J.nr. 0071-01587).

22. **Útgávur:**
    a. **Ársroknskapur 2006, Eik.**
    b. **Redegørelse 2006 / Perspektiv- og handlingsplan 2007, Minister for Ligestilling.**
    c. **Grein í Campus nr 4 26.2.07 "Forskningspointtælleriet".**

Frágreiðing: Annika Sølvará